| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 19. juli 2014 |
| Býráðsfundur nr. | 09/2014 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | |
| | |

Ár 2014 tann 19. juli kl. 14.00 varð eykabýráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 17. juli 2014 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**

Sonni á Horni
Magnus S. Midjord
Sigga Óladóttir Joensen
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Petur Abrahamsen
Árant Berjastein
Birgir Petersen

Eyðun á Lakjuni varð burturstaddur í summarfrí, eins og Jákup Frants Larsen eisini er staddur uttanlanda í summarfríu.

**Skrivari:**

**Mál nr. 26/2014.**

**Umsókn frá P/F Bergfrost um byggiloyvi til uppíbygging niðaneftir.**

Fuglafjarðar kommunna hevur móttikið umsókn frá P/F Bergfrost, dagfest 12. februar 2014 um byggiloyvi til at leingja bygningin (høllina) hjá felagnum niðaneftir.

Vinnunevndin hevur á fundi tann 18. februar 2014 játtað fyrispurningi frá P/F Bergfrost um at byggja umleið 10 metrar niðaneftir frá verandi bygningi.

Kommunan hevur nú móttikið tekning/umsókn frá MTV, har teir verga P/F Bergfrost biðja um loyvi at byggja 14 metrar niðan frá høvuðsbygninginum, sum er 10 metrar niðan frá trukkhølinum, sum annars er í samsvari við játtanina hjá vinnunevndini.

Í skrivi, dagfestum 04. Juli 2014 frá NOTIR v/Petur L. Olsen eru brunaviðurskiftini fyri hesa bygging lýst, og eru í samsvari við KKB99.

Málið hevur verið til viðgerðar í vinnunevndini og teknisku nevndini (felagsfundi) tann 14. Juli 2014 og verður mælt til, at byggiloyvi verður givið sambært fyriliggjandi umsókn, solieðis at kloakkplanur skal verða góðkendur av teknisku deildini. Upplýsningar um stabilitet skulu verða fyrilagdir teknisku deildinim og liðug gólvkota skal somuleiðis verða ásett av teknisku deildini.

Bygningurin kann ikki uttan loyvi frá kommununi verða nýttur til annað virksemi enn at seta frystan fisk í ávegis til frystigoymslu.

Leigusáttmálin verður dagførdur sambært hesum.

Við hesi avgerð verður samtykt býráðsins frá 20. juli 2013 um prinsipiellt byggiloyvi til P/F Havsbrún til goymslubygning upp á 2.340 m2 niðan móti berginum sett úr gildi.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá vinnunevndini. (8-0).

**<u>Mál nr. 27/2014.</u>**

**Umsókn frá P/F Havsbrún um bygiloyvi til mjølgoymslu á havnarøkinum.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá P/F Havsbrún, dagfest 07. apríl 2014 um byggiloyvi til mjølgoymslu á økinum frá frystigoymsluni hjá laksaavirkinum og suðureftir, og at verandi bygningar hjá Havsbrún, sum standa í vegin á hesum øki, verða tiknir burtur.

P/F Sandgrevstur hevur í skrivi, dagfest 29. apríl 2014 víst á, at teir í skrivi, dagfestum 19. September 2011 hava víst á hetta øki sum ein møguleika hjá teimum at byggja ein goymslubygning.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundum í vinnunevndini og teknisku nevndini (felagsfundi) tann 14. juli 2014 og verður mælt býráðnum til, at prinsipiellt loyvi verður givið til Havsbrún at byggja mjølgoymslu á økinum sunnan fyri frystigoymsluna hjá laksavirkinum, og at hetta verður gjørt eftir nærri ásetingum frá kommununi viðvíkjandi dispunering av økinum.

Viðvíkjandi skrivinum frá P/F Sandgrevstri verður hildið, at ein loysn kann verða funnin, har verandi bygningar hjá felagnum upp á 1.210 m2 kunnu verða partur av.

Áðrenn hetta mál varð viðgjørt fór Sigurð S. Simonsen av fundinum vegna ógjegni.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælunum frá vinnu- og teknisku nevndunum í málinum (7-0). Meðan málið varð viðgjørt og avgerð tikin varð Sigurð S. Simonsen ikki á fundi vegna ógjegni.

***Viðmerking í gerðabókina:***

Áðrenn viðgerðin byrjaði av máli nr. 27/2014 gjørdi Sigurð S. Simonsen vart við, at málið um mjølgoymslu til P/F Havsbrún ikki er liðugt viðgjørt í havna-/vinnunevndini, og tískil fyriliggur einki tilmæli frá nevndini.

Vísandi til § 6, 2. Petti í kommunustýrisskipanini, eigur býráðið at fáa neyðugt nevndartilmæli, <u>áðrenn býráðið tekur endaliga avgerð.</u>

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 15.00.

Magnus S. Midjord

Sigga Óladóttir Joensen

Dánjal Vang

Petur Abrahamsen

Sigurð S. Simonsen

Árant Berjastein

Birgir Peteresn

Sonni á Horni